## Stjørnureportarin Seymour Hersh:

# »Væl møguligt, at vit standa á



*»This will not be a happy hour!« vóru innleiðandi orðini hjá Seymour Hersh.*

**Í 1969 avdúkaði hann My Lai-massakruna framda av amerikanskum hermonnum í Vietnam. Og í 2004 avdúkaði hann ræðuleikarnar í Abu Ghraib fongslinum í Baghdad, framdir av amerikanskum hermonnum. The New Yorker-skribenturin Seymoura Hersh er ein stjørna í tíðindaheiminum, og hann hevur móttikið fleiri heiðurslønir, t.d. Pulitzer prísin. Umleið 300, ein stórur partur fjølmiðlafólk, lurtaðu eftir hansara fyrilestri í Dublin, 24. okt.**

*Nú snýr tað seg meiri um Iran, og minni um kjarnorkuvápn í Irak og fólkaræðið í Irak.*

*USA fer at gjalda ein høgan prís fyri tey mongu mistøkini í Miðeystri, í langa tíð frameftir. – Seymour Hersh*

*Hersh um forsetavalið: »I wouldn´t bet a nickle on the democrats winning the election!«*

## USA & Miðeystur



**Johan Jacobsen**

johan@sosialurin.fo

»Tað er væl møguligt, at vit standa á gáttini til eitt risastórt kríggj!«

Hesi eru orðini frá blaðmanninum við gylta umdøminum, nakað inni í hansara fyrilestri. Kríggið hann tosar um, skal í høvuðsheitum standa millum USA og Iran – og hann meinar veruliga í nærmastu framtíð. Hann sigur seg sova illa um næturnar, men vónar, at hetta fer at gerast betri í januar 2009. Tá verður forsetaval yviri í USA. Og hann vónar, at heimurin kemur væl ígjøgnum næsta árið, tí, sum fleiri onnur, so ræðist hann amerikanska forsetan George Bush.

Yviri í USA eru fyrireikingarnar longu byrjaðar til álop og møgulig hernaðarligt stríð við Iran. Ímeðan skeptikarar peika á, at USA á ongan hátt er áhuga í at fara í eitt umfatandi vápnað stríð ímóti Iran, orsakað av eftirfylgjandi ovurhondshøgum oljuprísum, so hevur deildin hjá CIA, ið arbeiðir við viðurskiftum kring Iran, fingið eina starvsfólkaøking á 100 % seinasta árið. Hetta er sambært keldum hjá Hersh. Somuleiðis hevur Hersh í seinastu grein síni í The New Yorker greitt frá skiftinum, sum er framkomið ta seinastu tíðina, í politikkinum hjá Bush í samband við Irak-kríggið.

Nú snýr tað seg meiri um Iran, og minni um kjarnorkuvápn í Irak og fólkaræðið í Irak. Keldur, lýstar av Hersh sum høgt standandi CIA-agentar, ið fyri stuttum er givnir, siga eisini frá, at tað minnir um heystið 2002 undan hertøkuni av Irak, tá ið alt snúði seg um Irak-borðið, ella »Iraqi Operations Group«. Nú snýr tað seg um »Iran-borðið«.

Tað sigst, at hann loyvir sær at siga meiri í sínum fyrilestrum, enn hann loyvir sær at skriva í tí hátt virda The New Yorker – blaðið, har tey kunnu brúka dagar uppá at kjakast um komma og punktum í einum setningi og har t.d. tú kann lesa greinar á 25 síður um at pendla ella um innanríkispolitikkin í Kongo. Tí er tað at vóna, at

Sosialurin